## Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

sosialurin — Altið fyrst við

www.sosialurin.fo

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til øll endamál!

Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**VEGG SAGING** Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING** Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING** Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2801, **Sp/f Bo›aberg, 240 Skopun.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Jónleif Láberg, 240 Skopun.

Felagi› er fari› í likvidatión vi› Niels Winther Poulsen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Box 6, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2997, **P/F Kaupthing Føroyar Vir›isbrævameklarafelag , 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 16.06.2000.
**N‡ggj hjánøvn:** P/F Keypting Føroya (P/F Kaupthing Føroyar Vir›isbrævameklarafelag) og P/F Keypting (P/F Kaupthing Føroyar Vir›isbrævameklarafelag)

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2226, **Sp/f Farybak Ventures, 100 Tórshavn.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Ove Lyhne, Høneborgvej 11, DK-9340 Asaa.

Felagi› er fari› í likvidatión vi› Annfinni V. Hansen, advokati, Gongin, Box 106, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2274, **Sp/f Í Króki, 100 Tórshavn.**

**Nevnd:**
Farin frá sum forma›ur: Katrin Ólfrí› Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn.
Innkomin sum forma›ur: Jón Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Jón Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Katrin Ólfrí› Johansen, Láarvegur 7, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2853, **P/F Atlantic Seafarm, 900 Vágur.**

**Vi›tøkur broyttar:** 08.06.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 88.000,00 til kr. 588.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 88.000,00 til kurs 36.363,6
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Atli Gregersen, 360 Sandavágur (forma›ur).
Innkomin sum forma›ur: Amy Bech, 926 Lopra.
Innkomin í nevndina: Gudmund Strømsnes, 6900 Florø, Norge.
**Grannsko›ari:**
Farin frá sum grannsko›ari: Sp/f ADS-grannsko›an, 826 Trongisvágur.
Innkomin sum grannsko›ari: P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2696, **Sp/f Nor›con, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 03.06.2000.
**N‡tt hjánavn:** Sp/f Zenit (Sp/f Nor›con)

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1794, **P/F Salmon River, 900 Vágur.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Atli Gregersen, 360 Sandavágur (forma›ur).
Innkomin sum forma›ur: Amy Bech, 926 Lopra.
Innkomin í nevndina: Gudmund Strømsnes, 6900 Florø, Norge.

Skráseting Føroya tann 24. august 2000

Kristin Balle

---


## Drama/sjónleikarskeið fyri ung og vaksin

Á Dramaverkstaðnum á Hálsi í Havn, Hallarheygur 2, verða fleiri skeið í drama og sjónleiki fyri ung og vaksin. Byrjað verður miðskeiðis í sept. og hildið fram til mai 2001.Undirvíst verður í ymiskum lærugreinum sum geva innlit og hegni í sjónleikarlist t.d.:

- Ymiskar venjingar í konsentratión
- Javnvágsvenjingar
- Kensluvenjingar
- Spøl
- Avspenning
- Andadráttsvenjingar
- Røddvenjingar og annað
- Improvisatión, tað er at gera ófyrireikaðar framførslur antin frítt ella við bundnum uppgávum
- Venjing í at leika sjónleik, t.d. venja ymisk stutt brot úr sjónleikum
- Teatersport
- Forumleik

Gleðin við at arbeiða við drama og sjónleiki er fremst í huganum, og har kunnu øll fáa okkurt burturúr. Ein kann siga hetta arbeiði er bæði til gaman og álvara.
Børn: Fyri alt skeiðið 1500,-
Tey yvir 14 ár eru undir Kvøld- og Ungdómsskúlanum.
**NB:Tey yngstu skulu vera fylt 9 ár áðrenn 01.09.00**

**Byrjarir:**
9 til 12 ár (1989 – 1991 ) Týsdag kl. 15.00 til 16.45.

**Byrjarir/ Eitt sindur roynd:**
9 til 12 ár (1989 – 1991 ) Mánadag kl. 15.00 til 16.45.
12 til 14 ár (1986 – 1989 ) Hósdag kl. 15.30 til 17.15.
14 ár og eldri (1986 og eldri ) Fríggjadag kl. 16.00 til 18.00.

**Byrjarir/Roynd:**
16 ár og eldri (1983 og eldri ) Hósdag kl. 17.30 til 20.30.

**Nógv roynd (framhaldsbólkar):**
11 til 13 ár (1987 – 1989 ) Mánadag kl. 17.00 til 19.00.
11 til 13 ár (1987 – 1989 ) Týsdag kl. 17.00 til 19.00.
14 til 18 ár (1982 – 1986 ) Mikudag kl. 17.00 til 19.30.

Tilmelding:
Tlf. 31 60 28 millum 16.00 og 18.00.

**Barnasjónleikarfelagið • Dramaverkstaðið**
Hallarheygur 2, FO 100 Tórshavn • Tlf. 31 60 28 31 19 83 • e-mail:hjck@post.olivant.fo
http://kort.olivant.fo/~hjck/

Sosialurin - 311820

**PRENT?**
…arbeiðsseðlar, álit, ársfrágreiðingar, ársroknskapir, blokkar, bløð, bóklingar, brævbjálvar, brævpappír, bøkur, faldarar, gávukort, gravsálmar, innbjóðingarkort, jólakort, klistrimerki, kvittanir, listabøkur, lógarsøvn, lutaseðlar, mappur, orðabøkur, plakatir, postkort, príslistar, produktbløð, putlispøl, rokningar, sanghefti, skreytbløð, takkarkort, visittkort (og nú er tíverri onki plás eftir, ring og spyr)…

Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

**Robustar blandimaskinur**

- Tvangsblandarir 38–800 ltr.
- Blandimaskinur 130 – 180 ltr.
- Breitt úrval av stav og bjálka-vibratorum

Fáast við el, bensin ella dieselmotori

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**ÚTSØLA Í "MÁLING & GÓLV"**
sí okkara lýsing á síðu 11








Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo


# FM møguleikin er komin óvart á vágbingar og HB

*Bæði í Vági og í HB vóna teir at vinna FM, men teir undirstrika samstundis, at teirra lið longu hava útinnt tað, sum tað varð roknað við frammanundan*

Tað er toppdystur á skránni á Vágs eiði í morgin. VB er nærri FM heitinum, enn teir nakrantíð áður hava verið, og um teir vinna í morgin hava teir framvegis sjálvir møguleikan at avgera.

HB er oddalið, og í felagnum tevja tey væl kenda deymin av gulli. HB stuðlarnir skipa fyri útferð til Vágs í morgin. Um tað ikki eydnast í hvussu so er at fáa eitt stig, so verður talan sjálvandi um vónbrot, men í felagnum undirstrika tey staðiliga, at teirra lið longu hevur nátt tí, sum tað undan kappingarbyrjan varð vónað:

– Tað er sera hugaligt at vera HBari. Frá teimum minstu og upp til 1. deild er lagið gott. Í 1. deild saðlaðu vit um í vetur. Vit hava nógvar ungar spælarar, og teir nýtast ikki at fara til Vágs tyngdir av nervum. Vit hava sagt teimum, at vit vóna at vinna FM innanfyri tey bæði næstu árini. Í ár høvdu vit vónað at fáa heiðursmerkir. Tað rokni eg avgjørt við, at vit fara at gera. Um tey verða av gulli, so verður tað frálíkt. Um tey ikki vera so fín, so verða vit eitt sindur vónbrotnir, tí vit liggja so væl fyri, men í tí stóra og heila eru vit sera væl nøgdir, og tað vita spælararnir.

Tað er Gunnar Mohr, formaður í HB, sum vit hava í telefonini. Hann ætlar sær til Vágs í morgin:

– Tað er onga staðni í Føroyum so torført at spæla sum í Vági. VBararnir eru altíð raskir á heimavølli, men umstøðurnar eru ikki góðar. Undirlendið er ikki gott, og serliga tá tað regnar, er tað torført at spæla. Allir, sum hava spælt har suðuri, vita, at tað er sjáldan stilli, og at tað hjá vitjandi yvirhøvur kennist fremmant og torført. Eg havi sjáldan verið við til at vinna í Vági, men eg havi heldur ikki tapt so ofta. Mest vanliga úrslitið hjá HB plagar at vera javnleikur, heldur Gunnar Mohr.

Hjá HB er liðformaðurin, Rúni Nolsøe, sum var leikbannaður seinast, við aftur. Florin var eisini leikbannaður, men tað man vera ivasamt, um hann kemur beinleiðis á liðið. Gigi er farin heim til Craiowa. Hann skal leggjast undir skurð, og undan fráferðini segði 38 ára gamli maðurin seg rokna við, at hann hevði spælt fyri síðstu ferð á høgum støði.

### Síðsti sigurin í 1991

Nú eru tað longu tvey ár síðani, at Gunnar Mohr gavst í 1. deild. Men hagtølini siga, at tað altíð hevur verið rár hending, at HB hevur vunnið í Vági. Síðsti HB sigurin í Vági var í 1991. Tá vunnu teir 2–1, og tað gjørdu teir eisini í 1988.

Av teimum ellivu dystunum síðani 1988 eru fýra endaðir við javnleiki, og VB hevur vunnið fýra ferðir. Bara eina ferð hevur munurin verið meiri enn eitt mál. Tað var fyri tíggju árum síðani. HB vann FM, men í Vági taptu teir 3–1. Í fjør vann VB 1–0.

### Ikki nóg støðugir

Óli Holm er nevndarlimur í Fótbóltssambandinum. Hann býr í Vági, og hann spældi í mong ár við VB. Besta árið hjá honum og VB var í 1974. Ta ferðina vunnu teir bæði ísafjarðarsúluna og felags steypakappingina, og tá var tað, at teir eftir 2–0 sigur á HB á Vágs eiði eitt stutt skifti royndu at vera fremstir í landskappingini.

Óli Holm er, sum flestu vágbingareru tað, spentur um gongdina, men hann heldur, at VB longu hevur megnað so nógv, sum tað frammanundan kundi roknast við.

– Sjálvandi droyma vit í verandi støðu um at vinna FM. Men tað er langt á mál. Um VB vinnur í morgin, haldi eg avgjørt, at møguleikin at fáa heiðursmerkir er sera realistiskur, og so kunnu tey eisini verða av gulli. Um VB tapir, so er møguleikin væl hugsandi, at VB ikki fær heiðursmerkir. VB hevur fleiri torførar dystir eftir, B68 er undir liðini, B36 er bara trý stig aftanfyri, og NSÍ, sum so dyggiligа gav eina áminning um, at einki kemur av sær sjálvum, kemur við nógvari ferð.

*Dysturin millum VB og HB sunnudagin kann væl gerast avgerandi fyri, hvat FM-heitið endar í ár*



Hvat er tín meting av liðnum?

– Teir hava verið sera drúgvir, serliga á heimavølli. Men sjálvt um úrslitini fyri tað mesta hava verið góð, so haldi eg, at teir leikliga ikki hava verið so støðugir, sum oddalið eiga at vera. Frá dysti og til dyst og eisini í einstøku dystunum hava teir viðhvørt spælt væl, og so hava teir aðrar tíðir verið alt annað enn sannførandi. Men venjingarstøðan hevur ongantíð áður verið so góð í Vági, sum hon er akkurát nú.

Óli Holm vísir á, at hjá VB kunnu onnur viðurskifti enn sjálvt fótbóltsspæli hava stóran týdning fyri endastøðuna:

– Eg hugsi um møguligar skaðar og um kortini. Robert er leikbannaður hesa ferð. Hann hevur verið sera raskur. Hans Pauli Dahl og Petur Óli Samuelsen eru til skips, so hópurin er ikki so breiður. Fýra spælarar verða leikbannaðir næstu ferð, teir fáa gult kort. Sovorðið hevur stóran týdning, heldur fyrrverandi VB spælarin og núverandi FSF nevndarlimurin, Óli Holm.

JH

# Solbakken til FCK

*Høvuðsstaðarfelagið heldur á fram við at styrkja sær um hópin, og fríggjadagin varð triðja keypið í 14 dagar veruleiki*

JÁKUP MØRK

Hóast FCK ikki higartil hevur livað upp til heitið sum ein av heitastu biðlunum til DM-gullið, so er hetta so avgjørt ikki orsakað av, at leiðslan ikki roynir at gera nakað munagott.

_Seinastu tvær vikurnar hevur felagið styrkt seg við málverja, verjuleikara og áleypara, og fríggjadagin kom so ein nýggjur miðvallari til felagið.

### Besti í Danmark

Talan er um norska landsliðsleikaran, Staale Solbakken, sum av mongum verður roknaður sum besti miðvallarleikari í Danmark.

Hann hevur tey bæði seinastu árini leikt við AaB, har hann varð danskur meistari í 1999, men í ár hevur hann fleiri ferð tosað um at sleppa úr felagnum.

Umframt at hava leikt við AaB, hevur Staale eisini roynt seg í esnkum fótbólti, har hann eitt skifti var á miðvøllinum hjá Wimbledon.

Í 1999 varð hann kosin besti leikari í Donsku kappingini, og eisini í fjør varð hann mettir millum teir bestu.

Seinast vit frættu, á miðdegi fríggjadagin, væntaði bert ein kanning av heilsustøðuni hjá norska miðvallaranum. Við fyrivarni fyri úrslitinum av hesi, verður tí roknað við, at FCK hevur norskt stál á miðvøllinum,



*Ársins leikari í Danmark, 1999, verður væntandi við liðnum hjá FCK sunnudagin*

tá teir sunnudagin fara í holt við stórdystin móti Brøndby. Ein dystur sum hesu ferð hevur størri týdning enn nakran tið fyri Toda & Co.